# Hent trygdar-ráð á ferðini

Áðrenn eina ferð verður nógv gjørt fyri at fyrireika alt so væl sum tilber. Neyðugt er eisini at hugsa um ferðatryggingina í hesum sambandi.



INNBROT

*Mangan hava innbrotstjóvarnir lætt spæl, men ein hevur tó ikki fyri neyðini at hava virðislutir liggjandi frammi í bilinum*

**Ferðatrygging**

Minst til at kanna um tryggingarviðurskifti eru í lagi, tá tú fert at ferðast. Spurningar kunna vera um tú ferðast ofta ella sjáldan, um alt húskið er tryggjað, ella um tryggingin skal vera til einstakar persónar, fyri hvørji lond er tín trygging galdandi og hevur tú tørv á avboðstrygging?

Heimurin er stórur og fullur av spennandi upplivingum, og tí er umráðandi at tann ferðandi er tryggjaður bæði so og so. Her hava tryggingarfeløgini royndir at oysa út av.

**Stuldur uttanlands**

Um okkurt verður stolið frá tær, meðan tú ert uttanlands, so skal stuldurin fráboðast til løgregluna á staðnum. Løgreglan í Føroyum tekur ikki ímóti hesum fráboðanum.

Hendir stuldurin í Danmark, so hevur tú møguleika at fara inn á heimasíðuna hjá løgregluni í Danmark www.politi.dk fyri at fráboða stuldurin. Minst til at printa kvittanina frá løgregluni út, soleiðis at avrit kann verða sent tryggingarfelagnum.

**Ferðast við bili**

Skalt tú ferðast við bili, so lat ikki lutir, ið hava virði, liggja sjónliga frammi.

Freista ikki tjóvar við at lata virðismiklar lutir, so sum GPS´arar og Ipod liggja sjónliga frammi í bilinum.

Tak lutirnar, ið hava virði, við tær, tá tú fert frá bilinum, ella stong lutirnar inni í til dømis handkarúminum. Tað kann hava týdning fyri tín rætt til at fáa endurgjald fyri stolnar lutir, um hesir hava ligið frítt frammi.

UPPKVIKKANDI PRÍSIR
www.eikin.fo

Vit selja Kvik køkar og baðirúms møblar
***fyri danskan útsøluprís***

Skjótt og gott



kvik
**Rimini køkur**



Prísdømi
19.500

kvik
**Mano háglans køkur**



kvik
**Mano Sera køkur**

Sosialurin 341800

Kom út í Eikina og fá eitt prát – Nógv sera góð tilboð

Eikin

**Landsins størsta úrval – og bestu prísir**

Eikin Sp/f, tel. 321030, fax 316590, eikin@eikin.fo

*- eitt sindur hugnaligari*